Frítíðarvanlukkutryggingin hjá Føroya Fiskimannafelag

# HVUSSU ERT TÚ TRYGGJAÐUR?



FØROYA FISKIMANNAFELAG

2025

alka




# Hvat er ein frítíðarvanlukkutrygging?

Føroya Fiskimannafelag hevur gjørt eina avtalu við tryggingarfelagið Alka um eina frítíðarvanlukkutrygging fyri limir felagsins. Hetta er ein kollektiv trygging, eisini kallað samlagstrygging. Tað vil siga, at allir limir verða tryggjaðir fyri sama lága kostnað, uttan mun til aldur, inntøku og møguliga sjúku ella avlamni.

## Hvat fevnir tryggingin um?

Frítíðarvanlukkutryggingin fevnir um persónsskaða av vanlukkutilburði, tá ið tú ikki ert mynstrað/ur. Alka hevur víðkaðan dekning í síni vanlukkutrygging, grundað á eina breiðari allýsing av, hvat skilst við eina vanlukku. Allýsingin er hendan: "Ein brádlig hending, sum er orsøk til persónsskaða". Tað vil siga, at frítíðarvanlukkutryggingin, sum Føroya Fiskimannafelag hevur teknað hjá Alka, gevur tær ein munandi betri dekning enn tryggingin frá 2009. Á síðu 7 sært tú nøkur dømi um, hvussu frítíðarvanlukkutryggingin dekkar.

## Limaskapurin er fyrsta fyritreyt

Tryggingin er ein ágóði, sum tú fært við tínum limaskapi í felagnum. Men gev gætur: 180 dagar eftir at tú mynstrar av, so dettur tín limaskapur í Føroya Fiskimannafelag burtur! Harvið fer frítíðarvanlukkutryggingin eisini úr gildi.

Tí mást tú sjálv/ur gera nakað fyri, at tú skalt varðveita limaskapin og tryggingina (meira um hetta longur niðri).

## Nær ert tú fevndur av tryggingini?

Tá ið tú ert mynstrað/ur, so ert tú dekkað/ur av tryggingini hjá reiðarínum. Tað er tá ið tú hevur mynstrað av, at tú ert dekkað/ur av frítíðarvanlukkutryggingini, sum felagið hevur teknað hjá Alka.

Sum nevnt er frítíðarvanlukkutryggingin ein ágóði, sum tú fært við tínum limaskapi í Føroya Fiskimannafelag. Høvuðsreglan er, at tú ert fevndur av tryggingini í somu løtu, sum tú ert vorðin limur í Føroya Fiskimannafelag. Og øvugt: Ert tú ikki limur í felagnum, so ert tú ikki dekkað/ur av frítíðarvanlukkutryggingini.

**Nær ert tú ikki fevndur av tryggingini?**

1) Um tú sjálv/ur meldar teg út sum lim í Føroya Fiskimannafelag
2) Um Føroya Fiskimannafelag hevur strikað teg sum lim
3) Um limaskapurin í Føroya Fiskimannafelag dettur burtur. Gev gætur: 180 dagar eftir at tú hevur mynstrað av, so fellur limaskapurin í felagnum burtur! Og so er frítíðarvanlukkutryggingin ikki galdandi longur.

**Hvat skalt tú gera fyri at varðveita tryggingina?**

Vilt tú framhaldandi vera fevnd/ur av frítíðarvanlukkutryggingini hjá felagnum, eftir at tú ikki hevur verið mynstrað/ur í 180 dagar, so krevst

a. at tú setur teg í samband við Føroya Fiskimannafelag og teknar teg sum hvílandi lim – gjaldið er 100 kr. um mánaðin (2025)
b. at tú ikki ert í eftirstøðu við limagjaldinum
c. at tú rindar serstakt tryggingargjald til Føroya Fiskimannafelag – gjaldið er 320 kr. um mánaðin (2025) og
d. at tú ikki ert í eftirstøðu við tryggingargjaldinum

Tí er skilagott at gera tær okkurt slag av áminning, hvørja ferð tú mynstrar av, so tú verður mint/ur á, at teir 180 dagarnir eru um at renna út.



# Soleiðis ert tú dekkað/ur - galdandi frá 1. januar

## Við avlamni

| | |
|---|---|
| Um ein vanlukkuhending hevur við sær eitt meinstig uppá minst 5%, so verður skaðaendurgjald útgoldið. Endurgjaldið er eins stórt í prosentum, sum meinstigið er ásett til. Tá meinstigið verður ásett, verður talvan hjá Arbejdsmarkedets Erhvervssikring brúkt - 100% avlamni ......................... | 627.000 kr. (2025) |
| Tryggingarupphæddin fyri eftirlønarmóttakarar og fyritíðarpensiónistar, sum eru eldri enn 60 ár, og limir, sum hava rokkið fólkapensiónsaldur. | 313.500 kr. (2025) |

## Ískoytisendurgjald

| | |
|---|---|
| Um tú ikki hevði fylt 65 ár, tá ið tú vart fyri vanlukkuni, fært tú eitt ískoytisendurgjald, um so er, at meinstigið verður ásett til 30% ella hægri. Tað hevur við sær, endurgjaldið hjá tær verður tvífaldað. Samlaða endurgjaldið, tá ið meinstigið verður ásett til 100%, kann í mesta lagi vera | 1.254.000 kr. (2025) |

## Tannskaði

| | |
|---|---|
| Fært tú ein tannskaða, sum stendst av vanlukkuhending ella í sambandi við eting/tygging, so verða útreiðslur til tannviðgerð endurgoldnar, treytað av, at skaðin er viðurkendur av Alka: | Rímiligar og neyðugar útreiðslur |

## Øll sløg av ítrótti

Tryggingin dekkar allar skaðar, sum henda í sambandi við venjing ella luttøku í ítrótti – uttan mun til hvørja ítróttargrein tú íðkar.

## Viðgerðarútreiðslur

Í sambandi við vanlukkkutilburð dekkar tryggingin útreiðslur til fysioterapeut, kiropraktor, zonuterapeut, osteopat og akupunktør.

| | |
|---|---|
| Í sambandi við álvarsligar vanlukkur sum t.d. harðskap og ógvuslig ferðsluóhapp verða útreiðslur til viðgerð hjá sálarfrøðingi dekkaðar. | Í mesta lagi 10 viðgerðir |

## Pensiónistar og arbeiðsleys

eru sum meginregla dekkaðir alt samdøgrið, um tey lúka tær treytirnar, sum galda fyri tryggingina.

---

**Her kanst tú lesa meira**
**Í tryggingartreytunum kanst tú lesa meira nágreiniliga um dekningar og treytir – tryggingartreytirnar finnur tú inni á fiskimannafelag.fo**



# Nøkur dømi um endurgjøld

**Ferðsluóhapp**
Ein dagin, tá ið Petur var á veg til arbeiðis í bili, rendi ein annar bilur á bil hansara. Petur fekk skallabrot, breyt ryggin og fekk so álvarsligar trupulleikar eftir vanlukkuna, at tað varð staðfest, at hann var 100% avlamin. Tí fekk hann 1.254.000 kr. frá sínari vanlukkutrygging. Avlamisupphæddin var 627.000 kr., men eftirsum hann var meira enn 30% avlamin og yngri enn 65 ár, so fekk hann tvífalt endurgjald. Petur hevði eisini  itt av útreiðslum til heilivág. Tær vórðu goldnar av ábyrgdartryggingini hjá hinum bilføraranum, sum eisini rindaði fyri sviða og pínu.

**Tonnin brotnaði**
Ein dagin sat Janus og spældi við sonin heima við hús. Knappliga og av óvart rakti sonurin Janus á munnin við einum leikapetti, og ein tonn hjá Janusi brotnaði. Hetta vóru góðar tenn, sum einki bagdi og sum ikki høvdu verið viðgjørdar áður. Tí rindaði tryggingin fyri allar útreiðslurnar til tannviðgerðina.

**Vríggj-skaðar**
Ein leygardag skuldi Hans royna trampolinina hjá børnunum. Hann ger eitt hopp, men kemur skeivt niður, við tí úrsliti, at hann fær eitt vríggj í ryggin, sum ikki vil rætta seg heilt aftur. Vanlukkutryggingin hjá Føroya Fiskimannafelag fevnir um vríggjskaðar. Meinstigið hjá Hans verður mett til 5%, sum hevur við sær, at hann fær eitt endurgjald uppá 31.350 kr.

# Eitt peningaligt uggilsi, tá ið illa vil til

Hugsa um vanlukkutryggingina sum nakað positivt. Hon kann tryggja teg, um tú verður fyri óhappi.

## Hvussu skal skaði fráboðast?

Hevur tú verið fyri einari vanlukku, so skalt tú seta teg í samband við Føroya Fiskimannafelag, sum útflýggjar tær eina skaðafráboðan. Á Føroya Fiskimannafelag er starvsfólk, sum kann ráðgeva teg um, hvussu fráboðanin skal útfyllast. Tá ið skaðafráboðanin er útfylt, so skal hon sendast til Alka.

Tú kanst eisini boða frá vanlukkuhendingini við at ringja beinleiðis til Alka, har tú eisini fært ráðgeving um, hvat so hendir í málinum.

Á aftastu síðu sært tú, hvussu tú fært samband við Føroya Fiskimannafelag og Alka.

## Hvussu nógv fái eg, um eg verði fyri óhappi?

Um tú lýkur treytirnar, tá ið tú hevur verið fyri vanlukkutilburði, so dekkar frítíðarvanlukkutryggingin hjá Føroya Fiskimannafelagi soleiðis:

- Endurgjald verður latið, um meinstigið er 5% ella hægri
- hvussu stórt endurgjaldið verður í sambandi við avlamni, valdast meinstigið – er talan um 100% avlamni, so er endurgjaldið 627.000 kr. (2025)
- Við avlamni, har meinstigið er hægri enn 30% og tú ert yngri enn 65 ár, tá ið vanlukkan hendi, so kann talan verða um dupult endurgjald (í mesta lagi 1.254.000 kr. (2025))

Skattur verður ikki goldin av útgjaldinum.

## Sjúka og avlamni, sum var áðrenn

Sjúka ella avlamni, sum tú longu hevði, áðrenn tú bleivst fevnd/ur av tryggingini, geva ikki rætt til endurgjald. Tey kunnu heldur ikki hava við sær, at meinstigið verður ásett hægri enn tað hevði havt verið, um sjúkan ella avlamnið ikki var har. T.d. verður ein gamal knæskaði ikki endurgoldin. Harafturímóti, um nú knæskaðin verður størri av einari nýggjari vanlukkuhending, so fært tú endurgjald, treytað av at økingin í meinstigi er 5% ella meira.

## Hjálp til tannlækna- og viðgerðarútreiðslur

Í sambandi við tannskaðar, har Alka hevur góðkent skaðan, verða neyðugar og rímiligar útreiðslur til tannlæknaviðgerð dekkaðar. Alka dekkar eisini viðgerðarútreiðslur til fysioterapeut, kiropraktor, zonuterapeut, osteopat og sálarfrøðing. Alka skal í øllum førum góðkenna dekningin, áðrenn tú fært viðgerð. Útreiðslur til viðgerð verða bara goldnar til støðan er vorðin varandi (stationér) ella meinstigið er ásett.





## Dømir um endurgjald við 627.000 kr. sum mestu tryggingarupphædd

| | |
|---|---|
| Mist hoyrnina í øðrum oyranum<br>10% = 62.700 kr. | Mist høgru hond<br>60% = 376.200 kr.* |
| Mist sjónina í øðrum eyganum<br>20% = 125.400 kr. | Mist vinstru hond<br>55% = 344.850 kr.* |
| Mist hoyrnina í báðum oyrum<br>75% = 470.250 kr.* | Mist tummilin<br>25% = 156.750 kr.* |
| Mist sjónina í báðum eygum<br>100% = 627.000 kr.* | Mist annan fremstafingurin<br>10% = 62.700 kr.* |
| Mist høgra arm<br>70% = 438.900 kr.* | Mist annan fótin<br>30% = 188.100 kr.* |
| Mist vinstra arm<br>65% = 407.550 kr.* | Mist annað beinið<br>65% = 407.550 kr.* |

**Er meinstigið ásett til 30% ella meira, fáa persónar, sum eru yngri enn 65 ár, dupulta upphædd í teimum førum, sum eru merkt við * í talvuni**

# Ein limafyrimunur afturat

**Vit leiðbeina teg**
Frítíðarvanlukkutryggingin, sum Føroya Fiskimannafelag hevur hjá Alka, er ein ágóði, ið tú fært sum limur í felagnum. Hevur tú spurningar ella hevur tú brúk fyri hjálp til at fylla út eina skaðafráboðan, so ert tú væl komin at venda tær til Føroya Fiskimannafelag. Hevur tú aðrar spurningar, so kanst tú ringja til Alka á tlf. +45 70 12 14 16

**Vit vilja hava, at tú ert nøgd/ur**
Ert tú ónøgd/ur við eina avgerð, sum Alka hevur tikið í einum ítøkiligum máli, kanst tú klaga til Alka. Tá ið vit hava fingið klaguna, kannar Alka málið beinanvegin. Alka leggur seg eftir at svara skjótast gjørligt.

Um Alka ikki hevur givið tær viðhald ella tú og Alka ikki eru komin til eina semju, eftir at klagan er viðgjørd og svarað, so hevur tú møguleika at fara víðari við málinum til Fællesnævnet (tað er ókeypis) ella Ankenævnet for Forsikring (ímóti einum lítlum ómaksgjaldi).






FØROYA FISKIMANNAFELAG

alka